## Skeiv mynd av Grønlandi

Politiski framsøgumaðurin hjá grønlendska flokkinum Siumut, Lars-Emil Johansen, er sera misnøgdur við sendingina "Flugten fra Grønland", sum danska DR-sjónvarpið vísti fyrrakvøldið. Hann sigur, at sendingin vísir bara ta døpru síðuna av grønlendska samfelagnum og svarar til, at ein sending um tað danska samfelagið bara snúði seg um Vollsmose og pedofilimálið í Tønder. Hann heldur, at rúsevna- og rúsdrekkamisnýtsla er størsti vandin í Grønlandi.



*"Flugten fra Grønland" lýsir bara ta døpru síðina av Grønlandi, sigur Lars-Emil Johansen (Mynd: Heimastýrið)*

## Állurin í vanda

Altjóða náttúruverndarfelagsskapurin IUCN sigur í einari nýggjari frágreiðing, at umleið ein triðingur av teimum evropeisku feskfiskasløgunum eru í vanda fyri at doyggja út. Í Evropa eru 522 fiskafiskasløg, og sambært frágreiðingini eru 200 teirra hótt. 12 sløg eru longu útdeyð. William Darwall hjá IUCN sigur við Reuters, at feskfiskasløgini í Evropa eru verri fyri enn fuglurin og súgdjórini, og at tað er neyðugt við tiltøkum.

# At fáa føroyskar útisetar heimaftur

**- Kanningin kann geva okkum grundarlag at læra, hvussu vit megna at gagnnýta eitt sterkt tilknýti millum okkara samfelag og útisetarnar, og hvussu vit megna at eggja fólki til at búseta seg aftur í heimlandinum – ella at nýta sínar førleikar í heimlandinum í styttri ella longri tíðarskeið, sigur Norðuratlantsbólkurin**

FØROYSKIR ÚTISETAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindafundi í Nóatúni í morgun, sum Norðuratlantsbólkurin á fólkatingi skipaði fyr, legði bólkurin fram úrslit í eini nýggjari kanning um føroyskar útisetar í Danmark.

Tað var fyri sløkum ári síðan, at bólkurin hevði tíðindafund og boðaði frá, at hann hevði sett í verk eina kvantitativa kanning um føroyskar útisetar í Danmark.

At kanningin er kvantitativ merkir, at hon í fyrsta lagi snýr seg um taltiltar – og ikki um teir kvalitetir og kenslur, sum liggja aftanfyri avgerðina hjá føroyingum at búgva í Danmark.

Hetta er soleiðis í fyrsta lagi ein hagtalskanning.

Á tíðindafundinum í morgun beyð Høgni Hoydal, limur í Norðuratlantsbólkinum, vælkomin, og síðan tók Leivur Persson yvir.




*Tað eru Leivur Persson, Gunnar Bjarnason og Annika Smith, sum hava staðið fyri kanningini og hava lagt bóklingin, sum gjørdur er, til rættis. Høgni Hoydal er limur í Norðuratlantsbólkinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Saman við Anniku Smith, sum nú starvast í ST og Gunnari Bjarnasson, hevur Leivur havt ábyrgdina av, at kanningin bleiv liðug.

### Útisetar heimaftur

Endamálið við kanningini hevur verið at savna ítøkiligar upplýsingar um, hvussu nógvir føroyingar, býttir í trý ættarlið, búleikast í Danmark, og hvussu viðurskifti teirra eru.

Eitt av endamálunum við kanningini er at viðvirka til, at føroyskir útisetar í Danmark kunnu gerast eitt tilfeingi fyri føroyska samfelagið.

Norðuratlantsbólkurin hevur eitt nú til endamáls at virka fyri rættindum, samleika, sjálvræði og sjálvsvirðing hjá føroyingum og grønlendingum, bæði úti og heima.

Bólkurin heldur, at føroyingar og grønlendingar eiga at gerast sjónligir og vinna sær virðing og tilvitan um egnar møguleikar og avbjóðingar.

- Ein avgerandi táttur í hesum hevur verið at kannað, upplýst og skift orð um støðuna hjá okkara landsmonnum í Danmark. Tískil hava vit sett kanningina í verk um føroyingar og grønlendingar í Danmark, sigur Norðuratlantsbólkurin.

Lagt verður aftrat, at kanningin kann geva okkum grundarlag at læra, hvussu vit megna at gagnnýta eitt sterkt tilknýti millum okkara samfelag og útisetarnar, og hvussu vit megna at eggja fólki til at búseta seg aftur í heimlandinum – ella at nýta sínar førleikar í heimlandinum í styttri ella longri tíðarskeið.

# Eiga gott tilfeingi í Danmark

**- Heili 237 føroyskir útisetar í Danmark eru útbúnir fólkaskúlalærarar, samstundis sum tørvur er á útbúnum lærarum bæði í Føroyum og Danmark. Vit »eiga« eisini 97 maskinmeistarar, 71 skipsførarar, 29 búskaparfrøðingar og heili 60 løgfrøðingar sum útisetar í Danmark, sigur Leivur Persson**

FØROYSKIR ÚTISETAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tilsamans 22.549 føroyingar, býttir yvir trý ættarlið, búgva í Danmark.

Tað er talið, sum Norðuratlantsbólkurin hevur fingið at vita frá Danmarks Statistik. Hetta svarar til út við helmingin av samlaða fólkatalinum í Føroyum – ella 46,75%.

Í prosentum svara føroysku útisetarnir tó bert til 0,415% av samlaða fólkatalinum í Danmark.

Av teimum 22.549 føroyingunum í Danmark, eru tilsamans 9.741 fødd í Føroyum.

### Áhugaverd tøl

Á tíðindafundi í Nóatúni í morgun legði Leivur Persson fram bóklingin við nógvum ymiskum og áhugaverdum hagtølum yvir føroyskar útisetar í Danmark.

- Hyggja vit at nettotilflytingini til Danmarkar, sæst, at hon hevur verið javnt veksandi seinastu 30 árini. Tó er eitt lop í tíðarskeiðinum 1990-1994, tá nettotilflytingin veksur til tað tvífalda í mun til tíðarskeiðið 1985-1989. Í tíðarskeiðinum 1995-1999 og 2000-2005 minkar flytingin til Danmarkar rættiliga týðiliga, og vøksturin hesi árini er umleið tann sami sum fyri 1990.

Leivur legði aftrat, at árini, tá tilflytingin av føroyingum í Danmark, var størst, var undir stóru fíggjarkreppuni í Føroyum.

- Flestu føroyingarnir, sum hesi árini fluttu til Danmarkar, vóru í aldrinum 17-39 ár, og framvegis eru nógv ikki heimaftur komin.

Hann vísti á, at nettotilflytingin av føroyskum konufólki til Danmarkar var nógv størri enn nettotilflytingin av mannfólki.

- Árinini av hesum síggjast í Føroyum í dag, har fólkatalið er merkt av ójavnvág millum kynini, segði Leivur.

### Útbúgvingarstøðið

Sambært skráseting hjá Danmarks Statistik høvdu í minsta lagi 6.457 føroyskir útisetar í Danmark eina førleikagevandi útbúgving hin 1. januar 2006. Av hesum vóru 2.732 mannfólk og 3.725 konufólk.

- Hetta svarar til, at 28% av samlaðu útisetunum eru útbúnir. Siga vit, at tey stívliga 8000, sum eru í aldursbólkinum 0-16 ár, enn eru ov ung til at vera liðug við útbúgving, svarar hetta til, at í minsta lagi 45% av útisetunum (eldri enn 16 ár) hava eina førleikagevandi útbúgving.

Leivur legði aftrat, at í uppgerðini yvir fólk við útbúgving, eru bert tey tikin við, sum hava tikið eina útbúgving í Danmark.

- Vit vita, at nógvir føroyingar, sum búgva í Danmark, hava tikið eina útbúgving í Føroyum, eitt nú sjófólk, men hesi eru ikki skrásett sum útbúgvin. Soleiðis er talan um minimums-tøl.

### 237 lærarar

Í tølunum yvir, hvørjar útbúgvingar føroyskir útisetar í Danmark hava, sæst, at heili 720 fólk hava eina útbúgving sum heilsuhjálparar, assistentar og annað, meðan 410 eru útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingar.

- Vit síggja eisini í uppgerðini, at heili 237 føroyskir útisetar eru útbúnir fólkaskúlalærarar, samstundis sum tørvur er á útbúnum lærarum bæði í Føroyum og Danmark.

Føroyingar »eiga« eisini 97 maskinmeistarar, 71 skipsførarar, 29 búskaparfrøðingar og heili 60 løgfrøðingar í Danmark.

- Í uppgerðini síggja vit eisini, at talið av útbúnum føroyskum læknum í Danmark er 90, segði Leivur Persson.

Kanningin vísir eisini, at 435 mannfólk og 326 konufólk hava eina longri hægri útbúgving, og samanlagt hava 43 føroyskir útisetar í Danmark eina granskingarútbúgving.

### Inntøkuviðurskifti

- Galdandi fyri øll ættarlið og allar aldursbólkar er, at mannfólk samanlagt hava eina væl hægri miðalinntøku enn konufólk í sama ættarliði og aldursbólki. Hetta er sama mynstur, sum sæst aftur aðrastaðni í vesturheiminum.

Leivur Persson segði, at fyri øll ættarlið er eisini galdandi, at munurin á miðallønini millum kynini er lítil í byrjanini, men munurin gerst størri, tess eldri fólk gerast.